**Lygusøgur**

**Míni kelidýr**

Hey, eg eiti Óli. Eg eri 8 ár, og eg elski drekar. Einaferð tá ið eg gekk ein túr úti, kom ein dreki flúgvandi forbí. Hann spurdi, um eg vildi koma á hansara bak, og eg segði ja. Tað var mega stuttligt, og nú eigi eg hann, men eingin veit tað. Ein dagin vísti eg mammu míni hann, og hon bleiv mega kløkk. Shhh, ikki siga tað fyri nøkrum.

Eg eigi eisini ein hund, sum eitur Purla. Í gjár legði Purla 10 hvølpar, og teir eru ordiliga fittir. Eg gav Hanus í mínum flokki 2 og Mariu 3, so nú havi eg bara 5 eftir, men teir eru teir bestu í allari verðini. Tað kula er, at teir kunnu skjóta lasarar úr eygunum.

Jákup, 4.a

**Mánin**

Einaferð fóru eg og lítlasystir og mamma og pápi ein gongutúr við hundunum hjá okkum. Hundarnir eita Perla og Rudolf. Lítlasystir eitur Emma og er 5 ár, og hon er eitt sindur bangin fyri Rudolf. Eg eiti Elsebeth og eri 11 ár.

Tann dagin, tá vit fóru ein túr, bleiv alt knappliga bølamyrkt. Eg bleiv mega bangin, og Emma fór at gráta. Vit vistu ikki, hvat tað var, sum hendi. Men so hendi nakað ótrúligt, vit sóu mánan vera so tætt við jørðina. Mánin kom bara tættari og tættari hvørt sekund. Øll blivu mega bangin, og so rendi mánin á jørðina, og jørðin fór í knús. Men einki hendi við mánanum. Øll blivu so kløkk, men tað hendi einki við fólkunum. So tað endaði við, at øll fólk á jørðini máttu búgva á mánanum, og man kundi flúgva. Kul, ha?

Rannvá, 4. a

**Fýrbeinini**

Einaferð fóru eg og Lena at geva fýrbeinunum í skúlanum at eta. Men tá ið vit so opnaðu búrið, tóku fýrbeinini okkum og koyrdu okkum inn í búrið. So góvu tey okkum ormar og kál, men Lena náddi akkurat at toga okkum út úr búrinum. Aftaná fóru vit í Burger King.

Annika, 4. a

**Túrurin til Jupiter**

Hey, eg eiti Eyðfríð, og eg eri 12 ár. Eg vil til Jupiter, men eingin vil við mær, og eg tími ikki sjálv! Tað er keðiligt at fara sjálv, og eg veit faktiskt ikki, hvussu man ger.
“Mamma! Kanst tú koma við mær til Jupiter?”
“Nei nei, góða, tú kanst ikki koma til Jupiter.”
Ding dong.
“Eyðfríð, kanst tú lata upp, eg geri mat?”
“Ja, eg lati upp ...”
“Her er ein genta, sum hevur hoyrt, at vit vilja til Jupiter. Eg vil við! Mamma, kom líka her?”
“Hvat er tað, góðasta? Eg havi epli í ovninum!”
“Ja, orsaka, men eg vil gjarna spyrja, um tú og dóttir tín vilja til Jupiter.”
“Plzzz, mamma, eg vil so gjarna, góða sig ja.”
“Eg veit ikki, okay, vit gera tað!”
“Nær fara vit, í morgin, ha?”
“Hvat? Tað er tíðliga.”
“Ja, men tit søgdu ja, so vit síggjast í morgin. Ja, bei.”

“Góðan morgun, mamma.”
“So er tað upp, vit skulu vera har um tríggjar tímar.”
“Tað er um langa tíð, eg sovi víðari. Eg havi etið, og eg havi gjørt ekstra mat at hava við, so eg eri klár.”

Vit fara nú. Jupiter, her komi eg.

Silja, 4. a

**Familja mín**

Hey, eg eiti Øssur. Mamma mín eigur eitt hús, sum kostar 9000 milliónir dollarar. Og babba er heimsmeistari í Pokemon go. Hann eigur ein bil, sum kostar 100 billiónir, og eitt hús, sum kostar 1 millión dollarar.
Omma er heimsmeistari í rasara-koyring , og maðurin hjá ommu hevur eitt rúmdarskip, sum kostar 9000 billiónir krónur.

Og eg eri bara eg, lítli eg eri bara normalur kanska ...

Boas, 4. a

**Axel Ingi Eiriksson ...**
... spældi dyst á Tórsvølli móti Portugal.

So er dysturin í gongd. Axel Ingi byrjar inni. Føroyar skorar til 1-0. Síðan bleiv 2-0 og 3-0. Og so bleiv 4-0. Axel hevur skorað 4 mál í dag. Axel var so góður, at tað bleiv 5-0.
3 ára gamli Axel hevur skorað 5 mál í dag! Men síðan hoppaði Axel á Cristiano Ronaldo. Tað bleiv gult kort til Axel. Straffi. Ronaldo skorar til 5-1. Endaliga støðan bleiv 5-1 til Føroyar. Hetta var ein góður dagur.

Niels og Bragi, 4.a

**Vit eiga ...**

Eg eiti Pól. Eg eigi ein tikara og ein alligator. Mamma eigur alla verðina og rúmdina, og babba eigur sólina. Hann fekk hana í føðingardagsgávu frá mammu.

Omma mín er milliónerur. Hon eigur 99999 milliónir krónur. Abbi eigur hús á mánanum, og hann hevur eisini seyð har uppi ...

Búgvi, 4.a